HAGSTOVA FØROYA

Argir, 13-02-2024

Hoyringssvar til

Uppskot til løgtingslóg um heildarætlan fyri Kjarnuna (verklag um nútímansgerð av Toll- og skattaskipanum 2024 til 2029)

Hagstova Føroya hevur fingið uppskot til løgtingslóg um heildarætlan fyri Kjarnuna (verklag um nútímansgerð av Toll- og skattaskipanum 2024 til 2029) til hoyringar.

Sambært løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya er Hagstovan høvuðsmyndugleiki fyri hagfrøðiligum virksemi í Føroyum. Grein 1, stk. 2 sigur millum annað, at Hagstovan stendur fyri ella er við til at skipa og gagnnýta hagskráir hjá almennum myndugleikum, ið verða nýttar í almennu fyrisitingini og í vinnuni, og sum kunnu nýtast til hagfrøðilig endamál.

Verandi umsitingarligu skipanir hjá Taks eru ivaleyst millum týdningarmestu keldur til stóran part av almennum hagtølum, ið verða framleidd og útgivin av Hagstovu Føroya. Nevnast kunnu millum annað vinnuligir roknskapir, skattaroknskapir, samtíðarskattaskipanin, endaskráin, tollskráin, MVG-skráin og vinnuskráin.

Tað finnast umfatandi og kostnaðarmiklar skipanir í almennu umsitingini, ið eru mentar uttan at hædd er tikin fyri tørvinum á almennum hagtølum. Menningin av umsitingarligu skipanunum hjá Taks má taka hædd fyri hagtalsendamálum, og er tað av alstórum týdningi, at Hagstova Føroya sum evsti hagtalsmyndugleikin er partur í kravfesting til menning og nútímansgerð av umsitingarligum skipanum hjá Taks, soleiðis at upplýsingar kunnu gagnnýtast til hagtalsviðgerð innan karmarnar hjá Hagstovu Føroya.

Gilli Wardum, stjóri